Kygg og Koyr

Sjónvarp Føroya

Fríggjadagin kl. 20.00:

Gátan um tað livandi líkið 2:7



Benjamin Vibe Rothenborg

Eingin kennir mannin, og hann verður lagdur í úthúsið hjá læknanum. Men onkur sníkir seg út haðani um kvøldið — hvør? Og Louis sær líkið í einum báti dagin eftir — livandi....

Fríggjadagin kl. 20.55:

Lív ella deyð

Nøkur ung eru útferð. Tey reka oman eftir eini á í svimjiringum sínum. Streymurin tekur tey, og ein fær fótin fastan og sleppur ikki leysur aftur í tí ísakalda vatninum...

Fríggjadagin kl. 22.10:

Johnny Belinda



Richard Thomas og Rosanne Arquette

Hetta er am. filmur um ta ungu Johnny Belinda. Øll halda, hon er evnaveik — til ein sosialarbeiðari uppdagar, at hon er deyvstumm. Hann fer at læra hana at »tosa« — og tey verða væl...

Filmurin er frá 1982.

Leygardagin kl. 20.00:

Vísindi

Vit skulu fylgja við eini gall-steinsskurðviðgerð á Frederiksborg Amtssygehus í Hillerød...

Leygardagin kl. 20.45:

Elaine Paige á pallinum

Elaine Paige

Konsert við Elaine Paige: Momory, Don't Cry For Me, Argentina, I know Him so well, One Night in Bangkok o.a.

Leygardagin kl. 21.45:

Morse



John Thaw

Kokkurin í einari grikskari matstovu í Oxford verður myrdur. Stutt eftir verður eitt pinkubar, dóttir systir hansara, rænt. Morse heldur hetta hava samband hvørt við annað...

Sunnudagin kl. 21.55:

Fótbóltsdysturin 1:2

Árið er 1934, og Italia skal spæla ímóti Týsklandi um HM í fótbólti. Mussolini krevur at teir vinna, og tað sama ger Hitler...

Sunnudagin kl. 19.55:

Gerðin

Dokumentarfilmur um Bente Søndergaard, sum aftan á eina ferðsluvanlukku fekk álvarsliga pínu í andlitið. Men ein neurologur fann ikki orsøkina, og tí varð Bente send til sálarliga viðgerð. Hetta hevur kostað henni 14 ára stríð, hjúnalag og felags heim...

Týsdagin kl. 22.05:

Skeivi armur lógarinnar

Peter Sellers o.a.

Peter Sellers er ein »mótamaður« í London, men hann arbeiðir eisini í »undirverðini«. So broyist hann og hjálpir løgregluni, tá ið hann fær kapping frá einum australskum banda.

Hósdagin kl. 19.00:

Heiðið og kristið

Thora Hird og Jessica Swewell

Thra Hird spælir Mrs. Clarke, sum hevur fingið ein nýggjan granna, sum er italiumaður. Hann vil Mrs. Clarke einki hava at gera við, og hon hevur orsøk til tað.

Útvarp Føroya

Mánakvøldið kl. 19.00:

Skaldsøgan »Tvey«

eftir Martin Næs

Útvarpið fer nú undir at lesa skaldsøguna »Tvey« eftir Martin Næs. Martin Næs er føddur 9. juli í 1953 og er útbúgvin bókavørður. Hann hevur skrivað fleiri stuttsøgur og yrkingar.

Søgan snýr seg í stuttum um tvey fólk, so sum eisini heitið sigur frá: Trina, sum ikki er heilt ung longur, og Bjarki, sum heimafturkomin úr Danmørk eftir lestrartíð hevur fingið gott starv og nú vendir ungdómsins rættvísisfyrimynd bakið aftur fyri eina trygga tilveru fyri seg og sínu.

Hetta fær rithvundurin fram við at siga frá eini ferð til Danmarkar: Bjarki hevur verið fleiri tílíkar ferðir, men hetta er fyrsta ferðin hjá Trinu, ið umboðar stóran part av føroyingum: hon fer til Danmarkar at søkja sær heilsubót. Martin Næs lýsir við hesi skaldsøguni Føroyar og føroyingar í dag á fjølbroyttan hátt. Myndirnar eru nógvar og tankavekjandi. Bókin kom út í 1990 á forlagnum »Fannir«.

»Tvey« verður send í næstum hvørt mánakvøld, og tey, sum ikki hava høvi at hoyra hana tá, kunnu ísaðin lurta týsmorguni kl. 9.30. Fyrsti partur verður sendur nú mánakvøldið. Hans Jacob Hermansen fer at lesa skaldsøguna.

Hósdagin kl. 19.00:

»Kjøtprísir, ull og seyðasjúkur«

Í 4. og seinastu sending við Sniálvi Jóanesarson, bónda á Voss, verður fyrst tosað um kjøtprísir. Sniálvur grundgevur fyri, hví hann heldur at tað er rætt at norska seyðakjtið fær nógvan studning.

Sniálvur sigur, at jú meira rationelt seyðahaldið er, jú størri er vandin fyri seyðasjúkum. Hann greiðir frá nøkrum vanligum seyðasjúkum í Noregi.

Og at enda í sendingini vísir Sniálvur Jóanesarson á nøkur ting, ið hann heldur áttu at verið broytt við seyðahaldinum í Føroyum.

Tórður Mikkelsen leggur til rættis.

Morgunlestrar í Útvarp Føroya

20.—25. juli 1992.

Hesa vikuna lesur Absalon í Buð í Hvannasundi

Mánadagur 20. juli
nr. 250 Tín ríkis søk, mín Jesus, skal
Matt. 6,10

Týsdagur 21. juli
nr. 69 Jesus, kom og ver hjá mær
Matt. 3,1—2
nr. 74 Góði Jesus, Harri mildi

Mikudagur 22. juli
nr. 247 Man í huganum enn finnast
Matt. 18,20

Hósdagur 23. juli
nr. 229 Nú skínur sól í dýrd og mæti
Matt. 24,14

Fríggjadagur 24. juli
nr. 396 Komi ríki títt við megi
Mark. 4,30—32

Leygardagur 25. juli
nr. 255 Vár Guð er føst og haldgóð borg
Hebr. 12,28
nr. 332 Títt orð er, Guð, várt arva góðs